ORKAÐ

SKORSTEINSREINS | VENTILATIÓNIR | HÚSABJÁLVING

Vit orka at reinsa fyri teg!

+298 206500 | ORKAD@ORKAD.FO | WWW.ORKAD.FO | VIÐ JÚKSNARÁ 13, 513 SYÐRUGØTA

SKORTEINSREINS

Tað er sera umráðandi at reinsa skorsteinin, so rennisót og glassót ikki setir seg fast í skorsteinin. Er skorsteinurin bundin í brenniovn ella peis, ella er oljufýr sett til, má reinsast fyri at fyribyrgja, at eldur, ið stendst av glanssót, ikki kemur í skorsteinin.
Glanssót kemst av, at skorsteinurin er ov stórur og óbjálvaður, so her kann verða neyðugt við fóðring.
Rennisót kemur, um kondens er í skorsteininum. Tað blandast við sótleivdir, ið síðan spríkja ígjøgnum fugur, múrsteinar og betong í skorsteininum. Tekin um hetta eru myrkir plettar, súrur luktur og mislittir veggir inni og uttan á skorsteininum.
Ymist er, hvussu skorsteinar dálka. Tí kann vera gott at fáa ein kønan at hyggja at skorsteininum og siga, hvussu ofta tørvur er á at reinsa skorsteinin.

Er brúk fyri bráfeingis skortsteinsreinsan ella einum tilboð?

+298 206500

G.G! Tænastan kostar eyka fyri bráðfengis.

HEILDARLOYSN

Vit bjóða tær eina heildarloysn, her vit taka gamla skortsteinin niður og/ella seta ein nýggjan upp. Vit kunnu eisini hampa um skortsteinin við at klæða hann við timbri ella aluminium. Umframt hetta selja vit reinsilúkur frá donsku fyritøkuni Termatech, ið hóska væl til allar skorsteinar. Haraftrat hava vit hattar, ið verja fyri:

- *At fuglur ikki sleppur til at byggja reiður, tí tað kann tippa skortsteinin.*
- *At toran ikki slær niður í skorsteinin og fyri at fáa betur uppdrift.*

Sí úrval á heimasíðu okkara www.orkad.fo

ÁÐRENN



AFTANÁ

VINNAN

Vit bjóða vinnu og kommunum tænastur.

- *Vit reinsa ventilatiónur á skipum og stórum bygningum*
- *Vit reinsa skortsteinar og ketlar*
- *Vit reinsa bygningar, tak, takrennur, tún, garðar, parkeringspláss o.a.*
- *Vit bjálva við iso-útgerð*

Tú kanst leiga okkara iso-rens og/ella iso-nem útgerð, men vit reinsað ella bjálvað eisini fyri teg!

MYND: SKIPALISTIN.FO

Bakkafrost valdi Orkað at reinsa ventilatiónina á Hans á Bakka.

SKORTENSFEJERLAUGET

So kunnu vit endiliga kunngera, at vit eru tey einastu í Føroyum, sum eru limir í danska Skorstensfejerlauget.
Tað merkir, at vit nú kunna fáa alla neyðuga og viðkomandi vitan um skorsteinsøkið og sleppa til reglulig skeið o.a, so vit kunna vera fremst á hesum øki í Føroyum og veita uppaftur betri tænastu.
Og í næstum fara vit at hava útbúnar skorsteinssóparar í okkara fyritøku.

VENTILATIÓNSREINS

HVÍ REINSA VENTILATIÓNINA?

Vaknar tú við turrum hálsi ella nøs, kann atvoldin vera góðskan í luftini inni hjá tær. Tað er ikki nóg mikið at skifta filtur. Tað er eisini umráðandi at reinsa ventilatiónina fyri at halda luftina reina. Ventilatiónin reinsar ósunnar partiklar úr luftini, m.a. støv, blámusopp, hár av húsdjórum, bakterium og vætu, ið setir seg í ventilatiónsskipan, rør og filtur. Partiklarnir kunnu gerast til blámusopp, ið kann elva til ovurviðkvæmi og ampa fyri tey, sum eru í húsinum/virkinum. Tá ið hesir partiklar samlast í rørunum, missir ventilatiónin sín virkna.

NÆR OG HVUSSU OFTA SKAL VENTILATIÓNIN REINSAST?

Ventilatiónin skal helst reinsast triðjahvørt ár, alt eftir dustnøgdini, ið samlast á ventilatiónsventilinum. Tað er eisini umráðandi at skifta filtrið rætt. Er tað sett skeivt í, kann støv o.a. seta seg á ventilatiónsanleggið. Hetta elvir til, at dustið fer í luftina, sum verður blást inn í húsið.

FYRIMUNIR VIÐ AT REINSA VENTILATIÓNINA

Reinsa fyri betri inniumhvørvi:
Vit brúka 90 prosent av okkara lívið innandura. Hvør persónur letur dagliga umleið 2,5 litrar av vætu frá sær, sum fer í húsið. Tí er umráðandi, at inniumhvørvið er reint og sunt, og tað verður tað við at lata okkum reinsa.
Við regligum viðlíkahaldi sparir skipanin orku og fær longri livitíð, og hon verður ljóddoyvd, tí at hon skal arbeiða minni fyri somu luftnøgd.

ÁÐRENN AFTANÁ

ISO-NEM & ISO-REINS

Vit hava gjørt íløgur í sera góða útgerð, sum ger tað skjótt, lætt og bíligt at bjálva húsini ella reinsa rundan um húsini. ***Hetta er útgerð til tey, sum ynskja at gera tað sjálvi, men vit vilja fegin gera arbeiði fyri tykkum eisini.***

Ómaksleyst kanst tú koma eftir viðfestisvogninum hjá okkum við Júksnará 13 í Syðrugøtu ella fáa hann koyrdan til dyrnar.

HVAT ER ISONEM?

Iso-nem er pappírsbjálving. Pappírs-bjálving andar væl, og er betur enn annað bjálvingartilfar. 86% av pappírsbjálvingini er endurnýtslutilfar, og bjálvingin er tískil sera burðardygg og umhvørvisvinarlig. Haraftrat er hon orkusparandi og sera løtt og skjót at brúka.

Eru húsini illa bjálvað, kanst tú skjótt og lætt gera tað við at leiga útgerðina frá okkum. Við okkara útgerð, kanst tú sleppa til, har tað er trongt at bjálva.

Er tað ov dýrt at fáa ein handverkara at bjálva húsini? Vit hava vit loysnina!
Tað einasta, tú skalt rinda fyri, er nøgdin av bjálving, sum verður brúkt.

HVAT ER ISOREINS?

Sum fyritøka ella privat persónur, hevur tú møguleika at reinsa tekjur, takrennur, tún og klædning, eisini kanst tú alguviðgerða og rotverja bæði tún og klædning.
Øll neyðug útgerð og sápa eru í viðfestisvogninum.

Tú kann leiga iso-reins-vognin skjótt og lætt við avheintan.
Vit orka eisini at gera tað fyri teg.

Ring til okkara og fá eitt tilboð

+298 206500

BRENNIOVNAR

Vit hava umboð upp á brenniovnar frá Termatech. Tað er donsk dygdarvøra, ið heldur.

Hetta eru brenniovnar í serflokki, og úrvalið er stórt til allan tørv.

Vit veita eina heildarloysn til tykkum, ið vilja hava brenniovn og skorstein uppsettar eftir øllum ásettum krøvum, og vit eru tey einastu í Føroyum, ið veita slíka heildarloysn.

Tú kanst síggja okkara stóra úrval í okkara nýggja framsýningarhøli við Júksnará 13, áðrenn tú keypir.

Vit hava somu donsku prísir sum Termatech. Tilber at síggja úrvalið á heimasíðu okkara orkad.fo ella termatech.com

www.orkad.fo

FÓRÐRA SKORSTEININ ?

Hava tit hava trupulleikar av rennisóti, ella at kaminan kondensar?

Hetta kemst av, at kaminan er ov køld. Um ketilin verður skiftur, er sum oftast neyðugt at fóðra kaminuna, tí nýggju ketlarnir geva ikki sama hita frá sær, eins og teir gomlu gjørdu.

Rennisót kemur, um kondens er í skorsteininum. Vætan blandast við sótleivdum, ið síðan spríkja ígjøgnum fugur, mársteinar og betong í skorsteininum. Tekin um hetta eru myrkir plettar, súrur luktur og mislittir veggir inni og uttan á skorsteininum.

Rennisót fært tú ikki reinsað burtur, tá ið skaðin er hendur, men tú kanst fyribyrjga rennisót við at reinsa javnan, fóðra skorsteinin og kynda rætt.

Glanssót, harafturímóti, er sera eldfimt og kann økja um vandan fyri eldsbruna í skorsteininum. Glanssót kann koma, um skorsteinurin er ov stórur og ikki fóðraður. Eisini um tú hevur brenniovn ella peis og kyndir skeivt.Vandi fyri øktum glanssót er, um skorsteinurin ikki verður viðlíkahildin, ella tá ið tú brúkar brenniovn skeivt.

Vit ráða tykkum tí til at reinsa skorsteinin javnan.



- ***Við eini fóðring sparir pening við at minka um oljunýtsluna***
- ***Sleppur undan rennisóti og kondensi***
- ***Fært eitt betri inniklima og sleppur undan sóti***

HESI VALDU EISINI ORKAÐ